# Sólorka PLUSS – Tryggasta Góðalívið Sunnanfyri

Í 2021 fer sólin aftur at skína, og okkara trúgvu gestir koma aftur at vitja okkum. Meðan vit bíða eftir, at koronusmittan skal fjara fullkomiliga burtur, takkað verði koppingarevnum, heiluvági og góðari atferð, ynskja vit at veita tær eina munagóða eykatrygd, bæði heilsuliga og økonomiskt.

Vit eru einasta føroyska felagið, sum tekur ímóti og er um okkara gestir úti í heimi, og vit hava tí ein serligan møguleika at veita hesa eykatænastuna. Við henni leggja vit enn meira afturat tí, vit longu er kend fyri, tá tað snýr seg um • at hjúkla um nærveruna, hjálpina og trygdina á staðanum, og • at røkja økonomisku áhugamál tíni.

Sólorka PLUSS hevur soleiðis trý samanfallandi endamál, sum eru:

1. **At tú kanst vitja sunnanfyri, um tær leingist eftir tí**
2. **At tú kanst gera hetta ekkaleys/ur, tí vit minka um tann longu fjarandi smittuvandan í øllum liðum í vitjanini – tað veri seg ímillum gestirnar, á ferðini, undir uppihaldinum, á útferðum osfr.**
3. **At tú somuleiðis ekkaleys/ur kanst bíleggja, tí tú ikki missir tíni inngjøld, skuldi okkurt óvæntað hent**

## Hvat gera vit sum heild fyri at verja heilsu tína?

**Teir ymsu tættirnir verða evnaðir til hvørt ferðamálið sær, og teir verða støðugt dagførdir til gagns fyri gestirnar, men teir hava allir hetta til felags:**

- Vit hava neyvt samband við okkara egna heilsufakliga ráðgeva
- Vit eru sjálv á **ferðamálinum**, meta allatíðina um støðuna her og taka neyðug atlit. Vit fremja bert eina vitjan, um ferðamálið er grønt ella gult
- Vit virka fyri, at **gestir** okkara ikki smitta hvønn annan. Vit krevja kanning undan fráferð, um vit meta tað a vera neyðugt
- Við okkara egnu leiguflogførum*) gera vit sjálva **ferðingina** so afturlatna, at vandin fyri smittu frá øðrum minkar munandi
- Vit hava eitt starvsfólkatoymi, sum er um okkara gestir **allan solarringin**.
- Vit samstarva bert við nøkur fá úrvald hotel, sum hava **neyvar smittuminkandi mannagongdir**, og har vit hava persónligt samband við stjórn, leiðarar og starvsfólk. Sama er galdandi fyri bussfeløg.
- Starvsfólk okkara á staðnum hava hvønn dag neyvt **eftirlit** við, at hotel, bussar og onnur neyvt halda allar ásetingar, sum eru kravdar av myndugleikunum og/ella avtalaðar við okkum
- Vit bjóða nógv **innihald** og nógvar **útferðir og upplivingar**, sum bert eru fyri okkara gestir. Vit endurskoða støðugt okkara skráir, so tær hóska til aktuellu støðuna og galdandi leiðreglur
- Vit styrkja ta **nærveru, hjálp og trygd**, sum vit longu plaga at bjóða á staðnum við m.a. tøttum samstarvi við **skandinaviskt talandi læknar** – í summum førum hava vit enntá **egnan føroyskan lækna**
- Skuldi tað óvæntaða hent, at ein ella fleiri gestir noyðast at **verða verandi** á ferðamálinum longri enn ætlað, eru okkara starvsfólk framvegis um teir
- Vit samskifta á **føroyskum, sponskum og enskum máli**, so allir partar skilja hvønn annan neyvt
- Vit hava støðugt dagførda vitan um **lokalar leiðreglur** og tryggja, at allir gestir kenna tær
- Vit hava egna uttandura skrivstovu á staðnum hvønn dag, so vit kunnu **avgreiða allar spurningar og ivamál alt fyri eitt**

**) til Gran Canaria brúka vit tó beinleiðis rutuflúgvingina hjá Atlantsflogi*

## Hvat kanst tú sjálv/ur gera fyri at verja teg?

- Vit mæla til, at tú tosar við lækna tín um heilsustøðu tína, um heilivág og um møguliga koppseting.
- Tú eigur at tekna viðkomandi ferðatrygging og avlýsingartrygging. Tosa við tryggingarfelag títt um hetta. **Gev gætur, at tey føroysku tryggingarfeløgini kunnu hava ymiskar treytir!!**
- Tú eigur altíð **at fylgja øllum almennum leiðreglum** og teimum boðum og vegleiðingum, tú fært frá okkum ella okkara koronu-ráðgeva

## Hvat gera vit eyka undir sólorkusetunum?

**Sólorkuseturnar eru flaggskip okkara. Hetta eru festivalarnir fyri okkara mest tilkomnu gestir, og meðalaldurin er nakað hægri. Vit hava tí valt at gera ymiskt eyka burtur úr trygdini:**

- Vit hava ein eykastóran bólk av starvsfólkum fyri at styrkja **nærveruna, hjálpina og trygdina**.
- Vit hava **egnan føroyskan lækna og koronuserfrøðing** á staðnum og harafturat okkara **egna sjúklingakonsulent** á sjúkrahúsinum
- Vit hava eina **einastandandi avtalu við resort okkara Albir Garden**, sum m.a. ber í sær, at
- Almenn støð eru markað til okkara gestir burturav
- Gestir okkara fáa lyklar sínar á eini uttandura móttøku uttan at brúka reseptiónina
- Okkara gestir fáa síni egnu øki við svimjihyljarnar
- Vit hava sum vant Vaglið fyri okkum sjálv hvønn dag kl. 18
- Í uttandura klubba okkara verða serlig øki til okkara gestir burturav, og vit brúka ta stóru uttandura paveljongina sum okkara barr
- Vit hava egna inngongd til matstovuna og okkara egnu øki í matstovuni
- Borð okkara verða bert ruddað og væl vaskað, tá vit eru liðug at eta fyri at minka um sambandi við onnur
- Vit hava okkara egnu veiting av drykkivørum í matstovuni
- Innandura svimjihylurin verður fyri okkara gestir burturav
- Vit hava okkara egnu inngongdir og trappur í íbúðarblokkunum
- Strongu leiðreglurnar hjá Albir Garden eru undir eftirliti og støðugt eftirmettar av okkara koronuserfrøðingi, og Albir Garden strembar eftir at halda reglur, sum eru strangari enn tær, sum myndugleikarnir krevja
- Øll starvsfólk hjá bæði Sólorku og Albir Garden hava so lítið samband við onnur, sum yvirhøvur tilber

## Hvat gera vit fyri at verja inngjøld tíni?

- Vit hava eina konservativa fíggjarstýring, har vit ikki blanda saman inngjøld til ymiskar vitjanir
- Vit samstarva við fáar úrvaldar sterkar samstarvspartar
- Vit senda bert fakturur, meðan ferðamálið er grønt ella gult, so ferða-trygging ella avlýsingartrygging tín eru galdandi, um tú gerst sjúk/ur undir ferðini ella um tú gerst noydd/ur at avlýsa – eisini um talan er um koronu
- Harafturat hava vit eina víðkaða **ábyrgdartrygging** fyri at forða fyri møguligum **fíggjarligum avleiðingum** fyri okkara gestir, um okkurt óvæntað hendir

# Tey ymsu ábyrgdarøkini

## Ábyrgdarøkið hjá myndugleikanum

Tá tað ræður um spurningin, hvørt ein vitjan verður útint ella ikki, heldur Sólorka seg strangt til vegleiðingarnar frá myndugleikunum. Hetta kann t.d. gera seg galdandi, tá vandi er fyri avleiðingum av yvirgangi, kríggi, náttúrurvanlukkum, sjúkum ella øðrum. Vit fylgja myndugleikunum, tí at teir hava betri vitan og serfrøði til at meta um støðuna, og tí at tað kann hava bæði heilsuligar og umfatandi tryggingartekniskar ella aðrar formligar avleiðingar, um vit ikki gera tað. Sólorka brúkar sostatt júst somu skipan sum aðrir ferðasmiðir, ferðaskrivstovur, flogfeløg, tryggingarfeløg og onnur.

Í okkara føri er fremsti myndugleikin danska uttanríkisráðið, sum grundar sínar avgerðir og ráðgeving á tilmæli frá fleiri stovnum, teirra millum Heilsustýrinum og Serumstovninum.

## Ábyrgdarøkið hjá Sólorku

Sólorka tekur støðu til, hvussu vit á besta hátt fylgja galdandi leiðreglum og vísa skilagóð atlit, uttan at hetta órógvar upplivingarnar hjá gestunum ov nógv. Hetta gera vit fyri at fáa tað góða lívið, sum eyðkennir okkum, undir so tryggum umstøðum, sum tilber. Í sambandi við Covid-19 gera vit hetta í samstarvi við Pál Weihe, yvirlækna og professara, umframt við spanskar myndugleikar.

## Ábyrgdarøkð hjá tryggingarfeløgum og læknum

Í summum førum kunnu gestir, sum hava teknað seg til eina vitjan, ivast í, um teir eru egnaðir til at vitja uttanlands, eitt nú vegna sjúku ella brek. Sólorka kann ikki taka dagar ímillum støðuna hjá okkara ymisku gestum. Í tílíkum høpi er mannagongdin hon, at viðkomandi leitar sær ráð hjá lækna sínum. Metir læknin ikki, at tað er ráðiligt, at viðkomandi vitjar uttanlands, skal hann ella hon tosa við tryggingarfelag sítt um treytirnar fyri avlýsing. Sum kunnugt mæla vit altíð staðiliga til at hava hóskandi ferðatrygging og avlýsingartrygging.

Grundin til, at tað – sum ávíst í viðskiftatreytunum – ikki ber til at fáa goldin gjøld aftur frá Sólorku, um gestir avlýsa, tá farið er út um freistirnar, er, at Sólorka bert ræður yvir einum lítlum brotparti av inngjøldunum. Tey verða rindað ella sett í veð mótvegis flogfeløgum, hotellum, bussfeløgum og øðrum undirveitarum. Eitt nú leigar Sólorka mangan heil flogfør til at flyta sínar gestir við. Hesi hava ein frammanundan avtalaðan kostnað, sum Sólorka heftir fyri.

Støðan er øðrvísi, um myndugleikarnir broyta sínar tilráðingar á ein hátt, sum ger, at tað ikki ber til at útinna vitjanina yvirhøvur. Tá fáa gestir okkara inngjøldini aftur uttan læknaváttan otl.